**Reglur um veterinert eftirlit fyri vørur í transit**

Sambært veterineravtaluni millum Føroyar og ES eru Føroyar – tá talan er um at flyta vørur í transit – at meta sum ein partur av ES. Tað áliggur sostatt Føroyum at fylgja somu reglum, sum eru galdandi í ES.

Hetta merkir, at allar fiskavørur (og animalskar vørur annars) skulu um eina marknaðeftirlitsstøð – BIP-støð; tað er sostatt ikki avgerandi, um vøran er ætlað føroyska marknaðinum ella um vøran er ætlað triðjalondum. Hesar reglur eru ásettar við ES-direktivi 97/78/EØS frá 18. desember 1997.

Í sama direktivi er tó heimild hjá einstøku londunum at hava eitt avmarka eftirlit av fiski og fiskavørum, tá talan er um vøru í transit, jvb. art. 9 og art. 11, stk. 1, litra a og stk. 2, litra b. í ES-direktivi 97/78/EØS. ES hevur ásett nærri reglur um hetta avmarkaða eftirlit í ES Kommissións avgerð nr. 25/2000/EF frá 16. desember 1997.

Avmarkaða eftirlitið merkir í stuttum at:

- Vøra kann bert verða løgd upp á góðkendari marknaðeftirlitsstøð *og*
- Marknaðeftirlitsdjóralæknin (í Føroyum landsdjóralæknin) skal frammanundan hava givið loyvi til at vøran verður løgd upp.

Omanfyrinevndu treytir skulu verða loknar.

Harumframt er galdandi fyri:

- Beinleiðis umskiping:
    - Um vøran verður umskipað beinleiðis frá einum flogfari til annað flogfar ella frá einum skipi til annað skip, skal marknaðeftirlitsdjóralæknin hava boð um umskipingina, men ikki er neyðugt at fremja veterinert eftirlit. Um so er, at talan er um vanda fyri fólka- ella djóraheilsu, kann djóralæknin tó fremja skjalaeftirlit.

- Vøra, uppskipað longri enn 12 tímar/7 dagar og styttri enn 48 tímar/20 dagar (t.e. ávikavist flogfrakt og skipsfrakt):
    - Djóralæknin skal fremja skjalaeftirlit, um so er, at vøran, í sambandi við umskipingina, er uppskipað longri enn 12 tímar fyri flogfrakt og 7 dagar fyri skipsfrakt. Um so er, at talan er um vanda fyri fólka- ella djóraheilsu, kann djóralæknin harumframt fremja samleika- og fysiskt eftirlit av vøruni.

- Vøra, uppskipað longri enn 48 tímar/20 dagar:
    - Um vøra, í sambandi við umskipan, er uppskipað longri enn 48 tímar/20 dagar, skal djóralæknin fremja fult veterinert eftirlit av vøruni.

Er talan um vøru, sum er uppskipað styttri enn 48 tímar/20 dagar, er sostatt í útgangsstøði bert neyðugt við skjalaeftirliti.

Tað er tó – við atliti til ES direktiv 97/78/EØS – allarhelst neyðugt at nágreina føroysku reglurnar hesum viðvíkjandi meira. Arbeitt verður framhaldandi við málinum.

Tá tað snýr seg um reglur um fríhavnir verður víst til ”Frágreiðing um møguleikar at seta á stovn fríhavnir í Føroyum” frá 23. februar 1995. Tað er Fíggjarmálaráðið, sum veitir loyvi til fríhavn.